## Skrivstovulærlingur

Á skrivstovu okkara er nú møguleiki at fáa eitt lærupláss innan skrivstovuyrkið.

Auto Service er ein av landsins størstu bilasølum og umboðar bilamerkini Opel, Peugeot, Nissan og Saab.

Talan er um eitt fjøllbroytt starv, ið røkkur inn í hvønn krók í fakinum. Skrivstovulærlingurin fær upplæring og innlit í mannagongdir og arbeiðshættir í øllum skrivstovutættum hjá Auto Service.

Skrivstovulærlingurin krevur at vera fyrikomandi og at kunna samstarva við nógv ymisk sløg av fólkum. Stundum eru fleiri bóltar í luftini í senn og tá krevst, at viðkomandi hevur eginleikan at raðfesta. Av fakligum førleika lýkur FHS prógv treytirnar, men HH prógv er ein fyrimunur.

Umsóknir, við viðkomandi prógvum og cv, ið skulu vera okkum í hendi innan 1. mai, skulu sendast til:

Auto Service
Att.: Árni Rasmussen
Við Oyggjarvegin
FO-100 Tórshavn

OPEL PEUGEOT NISSAN SAAB





www.autoservice.fo tel. 345400 Auto Service


# Skrivaðu undir í tunlinum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag undirskrivaðu klokkan 13.00 í gjár semju um at leingja sáttmálan teirra millum í eitt ár.**

SÁTTMÁLI
*Tíðindaskriv*

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag valdi í fjør ikki at siga upp sáttmálan við Føroya Arbeiðsgevarafelag samstundis sum hin arbeiðarafeløgini. Tískil helt tann sáttmálin á fram uttan broytingar. Nú varð sáttmálin uppsagdur til 1. mai, og partarnir vóru samdir um at skriva undir semju um at leingja sáttmálan í 1 ár við somu broytingum, sum vóru gjørdar fyri hini arbeiðarafeløgini 1. mai í 2005.

Lønarhækkingin er sostatt 3% á eftirlønina. Av øðrum broytingum kunnu verða nevnd ein avtala um tøkni og ein avtala um neyðrakstur í alivinnuni í sambandi við sjúku.

# Spurnakanning um føroyskan kommunupolitikk

**Í hesum døgum fara øll tey, sum heystið 2004 stillaðu upp til kommunuval at fáa bræv við fyrispurningi um at fylla út spurnablað**

SPURNARKANNING
*tíðindaskriv*

Tá vóru 783 fólk uppstillað, 535 menn og 248 kvinnur. Vónandi fara tey flestu at vera beinasom at svara, so at kanningin kann geva eina góða mynd av kommunala fólkaræðinum í Føroyum.

Verkætlanin er partur av størri verkætlan, sum Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum stendur fyri. Arbeiðið við sjálvari spurnakanningin verður gjørt á Høgskolen í Molde, tað er Beinta í Jákupsstovu, sum stendur fyri tí arbeiðinum.

Kanningin er framhald av kanning, sum var gjørd fyri tveimum árum síðani. Tá vórðu øll, sum stillaðu upp til kommunuvalið í 2000 spurd um at fylla út spurnablað. Granskararnir fara at samanbera úrslitini frá hesi nýggju kanningini við úrslitini frá tí fyrru, og royna at lýsa spurningar, sum ikki vóru settir seinast.

Endamálið er at fáa lýst, hvørji fólk verða stillað upp til kommunuval og hvat tey halda um tað politiska virksemið í kommununum.

Høvuðsendamálið við spurnakanningin er at hon skal geva vitan um rekrutteringina av kommunupolitikarum: Hvussu verða valevni útvald í Føroyum? Hava tey uppstillaðu hug til politisk arbeiði, og hvørjum politiskum evnum tey eru serliga upptikin av? Hví halda tey seg verða uppstillaði, og hvussu var valstríðið?

Hesu ferð verða tey uppstillaðu og tey valdu eisini biðin um at siga sína hugsan um tær broytingar, sum nú fara fram í bý- og bygdaráðum.

# Kirkjukonsert í Vestmanna

Sunnudagin klokkan 17 verður konsert í Vestmanna Kirkju. Hesaferð eru tað vestmenningar, ið fara at manna kórið, ið skal fylla kirkjurúmið við sangi. Tað er Vestmanna Sangkór, ið skal hava sína várkonsert hendan seinasta sunnudagin í mánaðinum. Kórleiðari er Kári Bæk.

Seinastu tíðina hava fleiri kór vitjað kirkjuna í Vestmanna og hildið konsertir har. Hetta, tí kirkjan í Vestmanna er serliga væl egnað til sang og aðrar framførslur, har stór krøv eru til ljóðgóðsku.

Talan er um eina fjølbroytt skrá, sum telur fleiri sera væl kend løg. bæði á føroyskum, týskum og enskum.


# Tunnilsvika á Hotel Vágum

Ókeypis koyring gjøgnum tunnilin frá fríggjadegi 28.04. kl. 24.00 til sunnudagin 07.05. kl. 24.00

**Fríggjadag 28.04. kl. 23.00:**
*"Express" spælir til dans*
**Ókeypis atgongd!**

**Leygardag 29.04. kl. 12.00-22.00:**
*Stór Fjallabuffet við meira enn 30 ym. heitum og køldum rættum*
*Vaksin kr. 150,-/ børn ½ prís*

**Leygardag 29.04. kl. 12.00-19.00:**
*Stór hoppiborg á P-økinum*

**Leygardag 29.04. kl. 23.00:**
*"Express" spælir til dans*
*Lady's Night frá 23.00-00.30*

**Sunnudag 30.04. kl. 12.00-22.00:**
*Stór Fjallabuffet við meira enn 30 ym. heitum og køldum rættum*
*Vaksin kr. 150,-/ børn ½ prís*

**Sunnudag 30.04. kl. 12.00-19.00:**
*Stór hoppiborg á P-økinum*

**Mánadag 01.05. - fríggjadag 05.05. kl. 11.30 - 15.00:**
*Frokostbuffét kr. 75,-*

**Mánadag 01.05. - fríggjadag 05.05. kl. 11.30 - 22.00:**
*AirPort Steak kr. 78,-*

**Leygardag 06.05 kl. 12.00-22.00:**
*Stór Fjallabuffet við meira enn 30 ym. heitum og køldum rættum*
*Vaksin kr. 150,-/ børn ½ prís*

**Leygardag 06.05. kl. 12.00-19.00:**
*Stór hoppiborg á P-økinum*

**Sunnudag 07.05.kl. 12.00 - 21.00:**
*Sunnudagsmenu - 3 rættir kr. 155,-*

**Gistingartilboð:**
*250,- fyri hvønn í dupultkamari - íroknað morgunmatarbuffét!*

HOTEL VÁGAR
tel 30 90 90
hotel@ff.fo


# Brúðarmyndir



*Vit vilja takka øllum so hjartaliga, sum gleddu okkum á brúnabandsdegi okkara, 26. nov. 2005. Tykkum, sum við telegrammum, gávum, hjálp í køkinum og servering og øllum tykkum sum komu.*
***Heilsan Sjúrður og Molly Højgaard***